


# Ráðgevi til fíggjarvinnuna

Vilt tú vera við til at virka fyri, at føroyska fíggjarvinnan fær teir bestu møguleikarnar at virka, kappast og mennast? Í ár økist okkara virksemi til eisini at fevna um fíggjarvinnuna. Ert tú ráðgevin, okkum tørvar?

Sum ráðgevi, fert tú at arbeiða við kørmum fyri fíggjarvinnuna og at gera kanningar og frágreiðingar fyri Vinnuhúsið.

Arbeiðið fevnir um at:
- gera frágreiðingar og lýsingar av málum
- luttaka í arbeiðsbólkum og nevndum
- viðgera lógir og kunngerðir
- samskipa uppgávur fyri nevndir í vinnugreinafeløgunum
- vera við í fyriskipan av vinnuligum tiltøkum og átøkum

Í hesum sambandi krevst tætt samskifti við leikarar í føroysku vinnuni og við myndugleikar.

Vit vænta, at tú
- hevur hóskandi hægri útbúgving og arbeiðsroyndir
- hevur kunnleika til føroyska vinnu og umsiting
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at samskifta, bæði á føroyskum, norðurlendskum og enskum

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til fíggjarvinnuna.

Vit kunnu lova tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv í einum mennandi arbeiðsumhvørvi.

Løn eftir avtalu.

Skrivlig umsókn, merkt "Starv", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. august 2008.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til stjóran, Maritu Rasmussen, tlf. 30 99 00 / 23 99 09.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postsmoga 1038, FO-110 Tórshavn

Smærugøta 9A // FO-100 Tórshavn // Tel: +298 30 99 00 // Fax: +298 30 99 01 // industry@industry.fo

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY